# – Vit mugu ongantíð gloyma útnorður

**Göran Persson vendi sær beinleiðis til føroyingar, íslendarar og grønlendingar, tá norðurlendsku forsætisráðharrarnir hittust í Oslo mánadagin. - Tit eru ein partur av Norðanlondum, og tað eiga vit ongantíð at gloyma, segði hann**

ÚTNORÐUR
*Jógvan Hugo Gardar*



**Oslo:** Norðurlandaráðsfundurin í Oslo varð settur mánadagin klokkan trý.

Frammanundan høvdu teir fimm stjórnarleiðararnir í Íslandi, Noregi, Danmark, Finnlandi og Svøríki tíðindafund, har teir søgdu nakað um hvussu samstarvið kemur at verða komandi árini.

Göran Persson segði á hesum tíðindafundinum, at tað norðurlendska samstarvið kemur at hava tað gott framyvir, um tað megnar at liggja frammanfyri broytingunum í ES.

– So leingi norðanlond liggja eitt hanagleiv frammanfyri ES í menning av samstarvinum, so er europeiska samstarvið eingin hóttan móti tí norðurlendska samstarvinum. Vit noyðast at vera virkin og arbeiða hart fyri at náa okkara málum, segði Göran Persson.

Göran Persson rósti eisini Poul Schlüter fyri arbeiði sítt við frágreiðingini um at fáa burtur marknaðarforðingar.

## Eingin forðing

Finsk tíðindafólk bóru boð frá finskum politikkarum, sum halda at Danmark er ein forðing fyri skjótari menning í norðurlendska samstarvinum.

Hesum vísti danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, hvassliga aftur.

– Tann danska stjórnin setir norðurlendska samstarvið overlaga á breddan. Vit stuðla samstarvinum og leggja nógv í samstarvi bæði í Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum. Og vit ynskja at menna og at fáa nýggj øki við í hetta samstarv, segði Fogh.

## Gloyma ikki útnorður

Spurningurin um hvussu norðurlendska samstarvið skal yvirliva, tá so stórur dentur verður lagdur á samstarvið í Eystrasalti, kom eisini upp á tíðindafundinum.

Íslendski forsætisráðharrin Dávið Oddsson av-

*– Londini í útnorðuri hava víst at tey ynskja at vera ein partur av tí norðurlendska samstarvinum. Hetta veldiga øki sum umfatar Grønland, Ísland og Føroyar er sera týdningarmikið fyri tann norðurlendska samleikan og okkara felags søgu, segði svenski forsætisráðharrin Göran Persson*

vísti, at útnorður er við at detta burturímillum. Göran Persson legði afturat.

– Londini í útnorðuri hava víst at tey ynskja at vera ein partur av t norðurlendska samstarvinum. Hetta veldiga øki sum umfatar Grønland, Ísland og Føroyar er sera týdningarmikið fyri tann norðurlendska samleikan og okkara felags søgu. Sjálvt um tað ikki búgva so nógv í hesum partinum av Norðanlondum, so er landaøki stórt og serliga tað øgiliga stóra havøki.

Sjálvandi stuðla vit tí arbeiðnum sum fer fram í útnorðuri. Vit mugu ongantíð gloyma hendan partin av Norðanlondum. Vit hava tykkum í huganum og eg vóni at ongin í tí norðurlendska samstarvinum gloyma tjóðirnar í útnorðuri, segði svenski forsætisráðharrin Göran Persson í Oslo.

# Betri hagreiðing av tilfeinginum

**Útnorður gerst ein týðandi partur í arbeiðnum hjá norðurlendkau stjórnunum komandi árið. Hetta váttaði íslendski forsætisráðharrin Davið Oddson tá hann legði fram íslendsku ætlanina fyri samstarvi.**

ÚNORÐUR
*Jógvan Hugo Gardar*



*Davið Oddson og Kjell Magne Bondevik práta á fundinum í Oslo*

**Oslo:** Íslendski forsætisráðharrin Davið Oddsson legði á norðurlandaráðsfundinum í Oslo mánadagin fram ætlan Íslands fyri komandi ár. Ísland skal hava formannskapin í Norðurlendska Ráðharraráðnum í 2004.

Ísland velur at kallað sína ætlan "Norðurlendskt tilfeingið – fólkaræði, mentan og náttúra". Davið Oddsson sigur, at endamálið er betri at hagreiða tað, sum býr í fólki, náttúruni og í tí norðurlendska fólkaræðnum.

– Grannalandapolitikkurin í norðurhøvum fær stóran týdning hetta komandi árið, meðan Ísland hevur formannskapin í Ráðharraráðnum.

Hann sigur at Ráðharraráði hetta komandi árið skal brúka nógva tíð til at menna samsatrvi við grannalondini hjá Útnorðuri. Talan er um at royna at finna eitt gott samstarv við Nunavut og Nunavik í Kanada, Skotland, skotsku oyggjalondini, Írland og Norðurírland.

– Fyri øll hesi londini hevur havumhvørvi sera stóran týdning, vit hava øll skyldu til at gera okkara besta fyri at varveita havumhvørvi, og vit noyðast at samstarva fyri at hetta skal gerast uppá besta máta, segði Oddson.

Hann vísti millum annað á veðurlagsbroytingar, og hvat hetta hevur at siga fyri alt livandi í havinum. Havumhvørvi og orkubúskapur vera høvuðsevni fyri eini ráðstevnu sum Ísland skal skipa fyri komandi vár.



# Skeið fyri menningartarnað

**Tey menningartarnaðu hava tað seinastu vikuna verið á skeið á Føroya Fólkaháskúla. Vit vóru á vitjan hjá teimum, og fingu eitt prát við tey, um hvat tey hava gjørt í vikuni, sum nú er farin**

SKEIÐ
*Sem Johnsson/Joan Brockie, praktikantar*



Tað eru Jarvin Hansen og Hildur Hermansen, sum skipa fyri skeiðinum fyri menningartarnað, sum er á Føroya Fólkaháskúla.

Tey, sum luttaka, eru úr øllum Føroyum, og tey eru 20 í tali. Aldurin er frá 18 til umleið 50 ár.

Tey hava ymisk fak sum køk, list, smíð, drama, tilevning, og so eru eisini teldubólkar/myndabólkar. Tey fara eisini ymsar túrar, og tey hava millum anand verið og svomið og á Eiði og etið.

Tey gera mangt og hvat á skeiðnum, so sum at gera sápur og krem av ymsum slagi, og eisini gera tey stearinljós. Tey gera eisini mat, mála og smíða. Millum annað tóku tey eitt stórt træ niður, av tí at tað var deytt. Tey taka nógvar myndir, hugna sær og fáa nýggjar vinir.

Hetta er eitt skeið, sum tey sjálvi hava ynskt at sloppið til. Hetta er nakað, sum er fyrireikað eina tíð frammanundan, og ætlanin er, at tað verður aftur komandi ár. Tað eru seks lærarar, sum undirvísa. Skeiðið byrjaði mikudagin 22. oktober og endar í dag, mikudag.

Tey fara at hava eina framsýning við øllum ið tey hava gjørt, týsdagin 28 oktober.

## Yrking

Luttakararnir á skeiðnum hava havt sum uppgávu at yrkja, so her hava vit eina lítla yrking sum tey hava gjørt:

**Háskúlatankar**

Á Háskúla vit nú ganga
Og lærdóm royna at fanga
Vinir vit hava fingið
Tað er sum á ástartingið
Vit flenna og gráta hvørt um annað
Tað er mangt vit mugu ásanna
At gott er at vera góður við hvønn annan
Bæði í álvara og í gaman

# Stuttleika sær óført

SKEIÐ
*Sem Johnsson/Joan Brockie, praktikantar*



Vit hava tosað við tvær kvinnur sum eru á skeið á Føroya Fólkaháskúla.

Tær báðar eita Kristianna Kærbo og Miriam Reinert. Kristianna er 52 ára gomul, og Miriam er 32 ára gomul. Tær búgva báðar í Havn. Kristianna býr í Vesturgøtu, Miriam býr í Smærugøtu. Miriam arbeiðir á verkstaðnum Vón, meðan Kristianna arbeiðir á einum barnagarði í Havn, og tað hevur hon gjørt í 28 ár.

Tær báðar stuttleika sær óføra væl og hugna sær við at arbeiða sum kokkar í køkinum saman við tveimum øðrum. Tær hava fingið nógvar vinir á hesum skeiði. Kristianna sat og bant eina húgvu, tá ið hon sat og prátaði við okkum, og húgvuna fer hon antin sjálv at brúka í vetur ella fer hon at geva te-kannuni hana.

Tær borðreiða matin fyri hinum, sum eisini eru á háskulanum, og hendan dagin, vit vitjaðu, gjørdu tær bananasplit til dessert. Tær hava aldrin fyrr roynt at gjørt hetta, men vit kunnu hugsa okkum, at tað fer at smakka sera væl. Vit spurdu, um tær høvdu viljað verið longri á skeiðinum, og tað tímdu tær væl, kanska eina viku afturat, men so heldur ikki longri enn tað.

